

Seismikk-skip. Mynd: EMGS

# Metinntøkur frá sølu av dátur yvir Barentshavið

**Jógvan Hugo Gardar**

05.02.2015 - 07:58

Oljan.fo

Seismikkfelagið EMGS (Elektromagnetic Geoservices) kom í morgun við einum rokniskapi sum gevur afturljóð. Fyritøkan hevur millum annanð bygt upp ein dátugrunn yvir seismikk í Barentshavinum. Hesin grunnurin hevur stóran áhuga millum oljufeløg sum leita eftir olju og gassi.

Stóri áhugin fyri oljuleitingini í Barentshavinum, hóast lága oljuprísin, ger at EMGS nú saman við seismikkfyritøkuni TGS fara at savna inn meir seismikk í hesum stóra havøkinum.

Í fjórða ársfjórðingi í 2014 seldi EMGS dátur fyri 52,5 milliónir dollarar, samanborið við 44,9 milliónir dollarar sama tíðarskeið árið fyri.

Yvirskotið í fyritøkuni økti úr 1,5 milliónum dollarum til 15,1 milliónir dollarar. í donskum krónum er vøksturin úr 9,75 milliónum krónum, til góðar 98 milliónir krónur.

Fyri alt 2014 er yvirskotið 27,9 milliónir dollarar, svarandi til góðar 181 milliónir krónur. Í 2013 var talan um eitt undirskot uppá 15,1 milliónir dollarar, ella góðar 98 milliónir krónur